

Thomas Sarin stjóri, letur væl at samstarvinum við Føroyingar

eftir havhesti, so veiðumentanin situr í føroyinginum, smílist Thomas.

Thomas sigur, at í veruleikanum er Sarin´s Båter bert ein samlifabrikk, tí alt virksemið hjá fyritøkuni er lagt til rættis á tann hátt, at teir bert samla lutirnar saman. Vit eiga formarnar og tekningarnar til allar bátastøddir hjá okkum.

Thomas sigur, at tá t.d ein føroyingur hevur avgjørt hvønn bát hann skal hava, ja so fara vit til fleiri glasfipurverksmiðjum og spyrja um tilboð uppá sjálvan skrokkin.

Tá vit hava gjøt avtaluna, so "krøkja" vit bátaformin upp á bilin og koyra formin til tann, sum hevði lægst tilboð. Soleiðis hava vit 30 undirveitarar til alt okkara virksemið, og bara tí letur hetta seg gera.

Vit kalla henda mátan at arbeiða uppá fyri " ger tað tú er best til ", vit á Sarin´s Båter gera samliarbeiði og standa fyri allari fyrskipan.

Vit hava sera góðar umstøður til okkara virksemi, tí vit hava tvær stórar hallir, har 9 bátar eru inni í hvørjari, og har 15 mans hava sítt dagliga samlibandsarbeiði í hvørjari høll.

So hvørt vit gera samliarbeiði koma undirveitarnir við sínum veitingum, so hvør teir eiga tørn. Hetta er einasti hátturin at fáa virksemið at glíða, og prógvi fyri hesum er, at vit seinastu 10 árini hava økt um okkara framleiðslu hvørt ár, sigur Thomas Sarin at enda við Sosialin. – Seinri í mai, tosar Sosialurin við ein føroying, sum fer eftir sínum 34 fót báti á verksmiðjuni hjá Thomas.




*Thomas Sarin stjóri, letur væl at samstarvinum við Føroyingar*